# Húsarhaldsbreyt av Argjum vitjar í Klaksvík



Næmingarnir á Húsarhaldsbreytini í Argja skúla her avmyndaði í køkinum á Kokkaskúlanum í Klaksvík

**Hósdagin og fríggjadagin vóru næmingar av húsarhaldsbreytini í Argja skúla í Klaksvík, har tey vitjaðu ymsar skúlar og eisini vóru tey á vitjan á Føroya Bjór**

VITJAN
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Næmingarnir og tveir lærarar komu til Klaksvíkar hósdagin og fóru fyrst at vitja Føroya Húsarhaldsskúla, har Elizabeth Akursmørk greiddi frá og vísti teimum runt á skúlanum.

Síðani fóru tey á Føroya Bjór.

Fríggjamorgunin fóru tey so á Tekniska skúlan og á Kokkaskúlan og Klaksvíkar Sjómansskúla.

Ein av lærarunum sigur, at hetta er ein húsarhaldsbreyt og ætlanin er, at tey skulu fara at vitja aðrastaðni í landinum eisini. Hetta fyri at koma runt og kunna síggja, hvussu tað verður arbeitt á størri køkum og á virkjum, sum hava við matvøru at gera.

Hendan fríggjamorgunin, tá Sosialurin hitti tey, vóru tey stødd á Kokkaskúlanum. Tey fóru fyrst upp á, har sjómansskúlanæmingarnir halda til. Poli Mikkelsen, skúlastjóri greiddi frá. Síðani fóru tey niður undir, har kokkanæmingarnir stákaðust við at gera pizza til tey. Har greiddi Jákup Ziskason frá. Síðani kundu tey seta seg væl tilrættis við borðið at eta.

Jákup Ziskason segði, at fríggjadagur ikki er tann besti dagurin at vitja Kokkaskúlan, tí skúlagongdin endar á middegi, og tí verður ikki tann heilt stóra matgerðin gjørd.

- Men, men vit hava gjørt pizza til tey, sum tú sært, so heilt svangligt er tað kortini ikki, sigur hann.

Næmingarnir og lærararnir fóru avstað aftur fríggjadagin seinnapart.




# Sjálvt tað tunga er lætt hjá okkum

Hevur tú tørv á at flyta tungan farm t.d. elementir, byggitilfar, maskinur, bussar, bilar ella kanska heilar høllir til ella úr Føroyum, tosa so fyrst við Smyril Line. Longu tá er nógv vunnið.

Vit hava serkøn fólk og flutningstól, ið heinta góðsið á staðnum og síggja til, at góðsið verður flutt á tryggasta og besta hátt heilt fram á nýtslustaðið.

Okkara royndu fólk eru fús at veita tær bestu tænastu til kappingarføran prís - eisini tá talan er um tungan flutning.

Hevur tú farm til ella úr Føroyum, ert tú vælkomin at ringja til okkara. Vit eru í bestu venjing og hava longu hitað upp...

www.smyril-line.com

SMYRIL LINE

SMYRIL LINE CARGO
Jónas Broncksgøta 35 - 100 Tórshavn
Tel 34 59 60 • Fax 34 59 52

petur & petur • 320870


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu hjálpsemi og samkenslu, tá ið kæri sonur, beiggi, svágur, mammubeiggi, pápabeiggi og ommubeiggi okkara

**Jákup Edvard Lamhauge, lærari, á Toftum**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Meinhard Bjartalíð fyri troystarríka og hjartanemandi jarðarferðartalu.
Tøkk til Havnarkórið, strúkarar og Tórshavnar Manskór fyri sera vakra sangin og tónleikin.
Tøkk til tykkum, sum stóðu fyri ervinum.
Tøkk til sangarar og kirkjutænarar.
Tøkk fyri blómur, kransar og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunar vegna*
**Mamma, Jóhanna, Nicolina, Louisa og Sámal**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum mintust meg á 75 ára føðingardegnum 28. august.

*Kærar heilsanir*
**Signhild Magnussen, Fámjin**

## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum, sum á ymsan hátt gjørdu mær 80 ára føðingardagin so hugnaligan.

*Við heilsan*
**Dánjal P. Nielsen, Klaksvík**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gjørdu mær sjeytiára dagin ógloymandi, takki eg hjartaliga.
Ein serstøk tøkk til ommubørnini, sum pyntaðu borðini so vakurt.

*Kærar heilsanir*
**Amanda Kruse**




